## Ongland á beinari HM-kós



Wayne Rooney var í hopla og fekk tvey av málunum, tá Ongland við einum 3-1 sigri móti Hvitarusslandi í Minsk syrgdi fyri, at teir fingu sína bestu byrjan upp á eina undankapping nakrantíð. Steven Gerrard skoraði triðja enska málið í dystinum, sum syrgdi fyri, at Ongland framvegis hevur fult stigatal eftir fyrstu fýra dystirnar.

## Niðurtúrurin hjá Eysturríki heldur fram

Eysturríki tók ímóti Serbia á Ernst Happel Leikvøllinum í Wien í gjárkvøldið, og tað gekk av skriðuni hjá heimaliðnum. Serbia vann ein tryggan 3-1 sigur, og satt at siga var dysturin avgjørdur longu tá 24 minuttir vóru spældir. Milos Krasic legði serbisku gestirnar fram um, tá 14 minuttir vóru farnir, og so gekk skjótt. 4 minuttir seinni økti Milan Jovanovic til 2-0, og í 24. minutti hevði Ivan Obradovic økt til 3-0. Tá hevði Serbia skorað uppá allar sínar málmøguleikar, og alt var avgjørt. 10 minuttir áðrenn leiklok eydnaðist tað Marko Janko at pynta um úrslitið fyri Eysturríki. Áskoðaratalið var identiskt við íbúgvaratalið í Føroyum. 48.000 vóru til dystin á Ernst Happel Leikvøllinum. Eysturríksk pressa er samd um, at Eysturríki fyri triðju ferð á rað, ikki verður at finna í einum HM-endaspæli.

# Av for ....

**Símun Samuelsen varð offur fyri ógvusligari stempling, tá hann noyddist av vøllinum mikukvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Kaunas, Litava:** Pínan tóktist øgilig og øðin samsvarandi stór, tá Símun Samuelsen eitt korter fyri dystarlok var við undirlutan í eini tackling móti litaviska liðskiparanum.

- Fyrst og fremst má eg siga, at eg nokk leyp eitt sindur framav, tá eg gjørdist somikið illur. Eg fór í eina tackling, og maðurin hoppan upp, men tá hann kemur niður traðkar hann tilvitað niður í lærið á mær. Eg haldi tað er ótrúligt, at linjuverjin bert stendur tríggjar metrar frá, og ikki gevur nakað sum helst tekin til dómaran um tað, sum hendi. Tá talan er um altjóða fótbólt, so eigur hetta ikki at henda órevsað.

*Og tú fekk so eisini eitt gult kort, tá vildi vísa dómaranum, hvør avleiðingin var?*

- Tað var sjálvandi býtt av mær, og skal ikki henda. Men viðhvørt koma støður, har tú ikki ført stýrt kenslunum, og hatta var so ein av teimum.

*Var talan um ein veruligan skaða, ella var hetta meira eitt træbein, sum noyddi teg av vøllinum?*

- Tað dugi eg ikki at siga enn. Eg royndi at spæla víðari, men tað var púrasta vónleyst. Um tað er eitt træbein, so verður helst nógv betri í morgin, men tað kann eisini vera ein skaði. Um so er, so kann eg bara troysta meg við, at mín kapping nú er liðug, os í so máta hevði tað verið verri, um tað var onkur av hinum spælarunum, sum var fyri hesum, sigur Símun Samuelsen.



*Lærið hjá Símuni Samuelsen sá ikki serliga vakurt út, eftir at Tomas Danilevicius hevði plantað dobbarnar væl og virðiliga í vágbingin*

## Eydnast ikki altíð

**Christian Lamhauge Holst helt ikki sjálvur, at tað fyrst og fremst var møðin, sum bar við sær, at føroyska álopsspælið ikki gekk so væl mikukvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í mun til fantastiska avrikið móti Eysturríki leygardaign, so var Christian Lamhauge Holst ikki fult so sjónligur á vøllinum í Kaunas leygardagin. Sum fremsti maðurin á liðnum varð hann ikki í sama mun snúningspunktið í føroyska spælinum, og tað tóktist eisini, sum vóru beinini nakað tyngri hesaferð, enn tey vóru leygardagin. Nakað sum áleyparin tó sjálvur vísti frá sær.

- Tað er nokk meira ein spurningur um, at við hvørt eydnast tingini betur enn aðrar tíðir. Og so var eg eisini rættiliga einsamallur á toppinum, og so verður tað trupult, um tú hevur ov nógvar verjuspælarar at stríðast við, segði Christian eftir dystin.

*Og tú trívist kanska eisini betur, um tú ikki ert heilt fremsti maðurin á vøllinum?*

- Ja. Eg eri jú ikki tann skjótasti spælarin í heiminum, so mær dámar best at fáa bóltin spældan í føturnar, soleiðis at eg kann venda mær ella kanska finna ein viðspælara. Og í øllum førum er tað sera trupult at liggja einsamallur á toppinum, hóast eg sjálvandi veit, at vit eisini mugu hugsa um verjupartin í spælinum. Og tann parturin haldi eg eydnast væl í dag, segði Christian eftir dystin.

# Kunnu ikki gera meira

**Føroysku spælararnir kunnu væl og virðiliga hyggja í spegilið eftir dystin, har liðið enn einaferð leveraði ein stóran arbeiðsinnsats, sigur Jón Rói Jacobsen**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Kaunas, Litava:** Hóast talan enn eina ferð var um eitt av hesum heiðurligu tapunum, sum tað so ofta verður tikið til, so fekk Jón Rói Jacobsen illa verið ónøgdir eftir dystin í Kaunas mikukvøldið.

- Eg haldi, at vit kunnu vera nøgdir. Vit gera alt tað, sum vit eru mentir, og vit levera allir ein innsats, sum vit kunnu vera ernir av. Men tíverri var tað ikki nóg mikið til stig í dag, segði Jón Rói Jacobsen.

*Tað sá út til, at tit vóru merkir av uppgávuni leygardagin. Kendist tað eisini soleiðis á vøllinum?*

- Ja, tað gjørdi tað. Vit hava roynt at fyrireika okkum væl við at eta rætt og drekka nógv. Men tað merktist væl kortini. Tað er sera hart hjá okkum at spæla tveir landsdystir upp á fýra dagar. Ikki minst við tí arbeiðsavriki, sum vit gera, so merkist hetta øgiliga væl í dag, segði Jón Rói Jacobsen eftir dystin.



*Føroyska landsliðið eigur fjepparar kring allan heim. Hesin var komin til dystin, og seinni kom hann eisini á hotellið, har spælararnir búðu. Millum annað fyri at fáa prát við Jón Róa Jacobsen*